

# Eik við nýggjum uppsparingartilboði

Bústaðarkontan, har landskassin lat eykarentu til tey, sum spardu upp til egnan bústað, fall burtur 1. juli í ár. Eik bjóðar nú ein annan møguleika fyri uppsparing við eykarentu. Framtíðarkontan er uppsparingarkonta, har til ber at spara upp til tvinni endamál, bústað og útbúgving. - Vit halda tað vera umráðandi at spara upp til tey týðandi tingini í lívinum, sum til dømis bústað og útbúgving og tað er tann møguleikan, vit bjóða kundunum við framtíðarkontuni sigur Bjarni Olsen, stjóri í Eik Banka. Framtíðarkontan er ikki tíðarbundin, til ber at seta upp til hálva millión, og upp til 50 prosent av innistandandi kunnu brúkast til útbúgving, meðan 100 prosent av peninginum kunnu brúkast til at fíggja egnan bústað. - Tað serliga við framtíðarkontuni er eisini, at peningurin kann brúkast til størri umvælingar og umbygging av egnum bústaði, og tað ger kontuna áhugaverda fyri øll, sigur Bjarni Olsen. – Bæði foreldur, sum vilja tryggja børnum sínum eitt betri byrjanarstøði til útbúgving og bústað, og teimum, sum longu eiga hús, men umhugsa at spara upp við hægri rentu til framtíðar umbyggingar. Í løtuni er grundrentan á framtíðarkontuni 1,35 prosent + 0,75 prosent fyri innistandandi upp til 100tkr., og 1,35 prosent + 1 prosent fyri innistandandi millum 100tkr. og 500tkr.

# Vann atgongumerki til MJ

**Klokkan 19.30 í gjárkvøldið fekk 25 ára gamla Beinta Rasmussen í Sandavági at vita, at hon hevði vunnið tvey atgongumerki til minningarhaldið yvir Michael Jackson í Staple Centre í Los Angeles**

MINNINGARHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



- Eg prøvaði bara til stuttleika.

Tað sigur Beinta Rasmussen úr Sandavági um luttøkuna í kappingini at vinna atgongumerki til minningarhaldið yvir Michael Jackson, sum verður í dag.

Tað var av tilvild, at hon varnaðist kappingina inni á heimasíðuni hjá BT.

- Vit royndu so bæði, eg og sjeikurin. Tað stóð, at tey, sum vunnu, fingu boð sunnudagin, men tá eg hugdi inn á teldupostin hjá mær, stóð einki har, sigur Beinta Rasmussen.

Tá sjeikurin seinni hugdi inn á sín teldupost lógu eini boð har um, at hann ikki hevði verið heppin í kappingini og tískil ikki hevði vunnið.

Men klokkan 19.30 sunnukvøldið bar til.

- Tá eg hugdi inn á teldupostin tá, vóru eini boð komin. Tað vóru eini long boð um, hvussu er skuldi bera meg at við at fáa fatur á atgongumerkjunum. Og tað var við CONGRATULATIONS og passorði og øllum, sigur Beinta Rasmussen.

- Eg helt at byrja við, at talan var um okkurt tiltak í London, men so uppdagaði eg, at hetta var til sjálvt minningarhaldið í Los Angeles. Har stóð í, hvussu eg skuldi printa luttøkuskjalið út av telduni og levera tað í Los Angeles í gjár. So skuldi eg fáa luttøkubond útflíggjað, sigur Beinta Rasmussen.

Tað vóru umleið 1,6 milliónir fólk, sum høvdu luttikið í lutakastinum, og av teimum 8.750, sum vunnu tvey atgongumerki í part, var Beinta Rasmussen so ein.

Tíverri bar henni ikki til at sleppa við, partvís tí hon fekk hetta so seint at vita. Minningarhaldið er sum nevnt í dag, og tað tekur jú sína tíð at koma vestur um hav.

Beinta hevur leingi verið Michael Jackson-fjeppari, og var eitt nú til eina konsert við popp-konginum í Parkini í Keypmannahavn í 1997.

## Beinta er 5,3 milliónir verd

Av tí, at Beinta Rasmussen hevur tvey atgongumerki til minningarløtuna fyri Michael Jackson, er hon í løtuni 5,3 milliónir verd.
Tí atgongumerkini, sum hon hevur, verða í løtuni seld fyri 5,3 milliónir krónur fyri hvørja á Ebay. Sum er løtuprísurin fyri tær dýrastu.
Bíligastu atgongumerkini fara fyri góðar 1300 danskar krónur á Ebay. Men prísurin er hækkandi.
Við teimum 17.500 til minningarløtuna verða eisini Mariah Carey, Lionel Richie og nógv onnur kend, og tað verður enn dult, hvat forvitnisligt verður á skránni.
Í dag klokkan 18 føroyska tíð verður hátíðarhaldið fyri Michael Jackson, sum doyði 25. juni í ár 50 ára gamal.

*-eij*

SP/F HJÁLPIRÓT
Urtagarðsvirksemi

Góð mold til sølu

Sorterað, sandblandað mold
til sølu fyri 325 kr./m³

Hjálpirót Sp/f · Boks 1286
FO-110-Tórshavn · Tlf: 316505 / 516505

SLÁIMASKINUR
IÐ SLÁA ALT

- 2+2 gear ella 6+2 gear (báðar vegir)
- Prísir frá kr. 16.350 til 31.000



Knívar í ymiskum støddum frá 71 til 148 cm

Triv
Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo

BALLUPRESSUR
FÁIÐ SLÁTTURIN SKJÓTT OG VÆL FRÁ HONDINI

Plast av allar hægstu dygd og net serframleitt til okkara pressur



- Betri fóður
- Skjótari liðugt
- Lætt at handfara

Triv
Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo